ítróttur

Nr. 64 • fríggjadagur • 5. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Flogbóltsgalla

Leygarkvøldið fara flogbóltsleikarar úr øllum landinum at savnast til árliga gallakvøldið, og soleiðis seta punktum fyri nú lidna flogbóltsárinum

GALLAKVØLD
Jákup Mørk

Eftir at hondbólturin í farnu viku hevði sítt gallakvøld, verður tað flogbólturin, sum eigur tørn hetta vikuskiftið.

Leygarkvøldið klokkan 19.30 fara yvir hálvt annað hundrað flogbóltsleikarar og onnur við tilknýti til flogbóltin at savnast uppi á Hotel Føroyum. Ivaleyst verða øll í finasta stási, soleiðis sum vanligt er til slík høvi, og umframt ein góðan bita, so verður ivaleyst okkurt dansistevið roynt eisini.

Nominerað

Umframt hetta at øll hittast og takka hvørjum øðrum eftir eitt drúgt kappingarár, er hetta sjálvandi eisini løtan, tá ársins leikarar av ymsum slag skulu avdúkast.

Sjálvandi eru nógvir leikarar, sum kunnu koma upp á tal, men fyri at økja eitt sindur um spenningin, hevur Flogbóltssambandið nú sagt, hvørji tey eru, sum kunnu koma upp á tal til hetta. Ikki soleiðis, at FBF hevur gjørt av, hvørji hesi eru, tí hava leikararnir kring landið sjálvir gjørt. Heldur er tað fyri at geva ein forsmakk til sjálvt kvøldið.

Aðra staðni á síðuni framgongur, hvørji tey nomineraðu til heitini eru, og eftir er bara at vóna, at talan verður um eitt bæði hugnaligt og stuttligt kvøld hjá mongu flogbóltsspælarunum leygarkvøldið.

Ein av teimum nomineraðu til at gerast ársins leikari, er Maja Popovic úr TB. Til stuttleikar kann nevnast, at systir hennara, Maryna, í fjør vann hendan heiðurin

Møguligir vinnarar

kvinnur:

Ársins áleypari

Tina Jacobsen	Mjølnir
Helen á Lakjuni	ÍF
Gudrid Nolsø	TB
Tove Riksfjord	Mjølnir
Maja Popovic	TB
Anna Jacobsen	Mjølnir
Gudrid Nolsø	TB
Marina Popovic	Dráttur
Theresa Fjalsbak	Fleyr
Svanna Nielsen	TB
Sóley Philbrow	ÍF

Ársins blokkleikari

Helen á Lakjuni	ÍF
Tina Jacobsen	Mjølnir
Annika Rasmussen	ÍF
Svanna Nielsen	TB
Sólgerð Henriksen	Dráttur

Àrsins verjuleikari

Harriet Hammer	TB
Vera Larsen	Mjølnir
Maja Popovic	TB
Randi Larsen	ÍF
Marina Popovic	Dráttur
Elin Doris	Dráttur
Mariann Øster	Mjølnir
Anna Jacobsen	Mjølnir
Elin Doris Dam	Dráttur

Àrsins hevari

Marjun Kalsø	Mjølnir
Rúna Hentze	Fleyr
Anne Mia Johansen	TB
Randi Larsen	ÍF
Tóra Mortensen	TB
Mariann Øster	Fleyr
Torgun Joensen	Dráttur

Àrsins stjørnuskot

Ingunn Midjord	TB
Gudrid Syderbø	Fleyr
Kristina Jørgensen	Fleyr
Linda á Stongunum	Mjølnir
Fríða	ÍF
Guðrun Dimon	TB
Gurðli Joensen	Dráttur
Lív Torgarð	Fleyr
Lena í Buð	Mjølnir
Elin Doris Dam	Dráttur

Ársins leikari

Maja Popovic	TB
Gudrid Nolsø	TB
Helen á Lakjuni	ÍF
Tina Jacobsen	Mjølnir
Marjun Kalsø	Mjølnir
Svanna Nielsen	TB
Randi Larsen	ÍF
Sólgerð Henriksen	Dráttur
Anna Jacobsen	Mjølnir
Marina Popvic	Dráttur

Árins venjari

Virgar Djurhuus	TB
Boban Ilic	ÍF
Hermann Lindberg	Fleyr
Romica Øster	TB
Marjun Kalsø	Mjølnir
Niclas Joensen	

Møguligir vinnarar

menn:

Ársins áleypari

Rúni Weihe	Fram
Borco Ilic	SÍ
Jón Nielsen	SÍ
Boban Ilic	ÍF
Trygvi H. Poulsen	Mjølnir
Bartal Eliasen	ÍF

Ársins blokkleikari

Borco Ilic	SÍ
Kennet Neshamar	ÍF
Suni F. Petersen	Fram
Rajko Petrovic	SÍ
Ragnar Petersen	Fram
Romica Øster	Fram
Trygvi H. Poulsen	Mjølnir
Steinar Eirikstoft	Fleyr
Heiðrikkur Bergsson	Fram
Boban Ilic	ÍF
Rúni Weihe	Fram

Ársins verjuleikari

Joen Petur á Stongum	SÍ
Jan Hentze	Fleyr
Rúni Weihe	Fram
Trygvi H. Poulsen	Mjølnir
Bartal Eliasen	ÍF
Steinar Eirikstoft	Fleyr
Borco Ilic	SÍ
Biban Ilic	ÍF

Ársins hevari

Odd Eliasen	ÍF
Klæmint Isaksen	Fleyr
Kaj á Stongum	SÍ
Romica Øster	Fram
Bogi Isaksen	Mjølnir

Ársins stjørnuskot

Albin Johannsen	Mjølnir
Dánjal vang	ÍF
Joen Peter á Stongum	SÍ
Heiðrikkur Bergsson	Fram
Hanus Eliasen	ÍF
Andrass Jógvansson	Fleyr

Ársins leikari

Jan Hentze	Fleyr
Rúni Eltør	Mjølnir
Johannes Ejdesgaard	Fleyr
Trygvi H. Poulsen	Mjølnir
Steinar Eirikstoft	Fleyr
Rúni Weihe	Fram
Boban Ilic	ÍF
Jón Nielsen	SÍ
Borco Ilic	SÍ
Klæmint Isaksen	Fleyr

Ársins venjari

Romica Øster	Fram
Boban Ilic	ÍF
Borci Ilic	SÍ
Jan Hentze	Fleyr

Einki forgjørt í stuðli

10.000 krónur ljóða helst ikki av so nógvum, men tað hevur fingið ilt í fleiri, at ein almennur grunnur við sponsorpengum skal stuðla einum ítróttarfelag. Formaðurin í Framtaksgrunninum heldur tó einki forgjørt vera í hesum

STUÐULSPENGAR
Jákup Mørk

Danir hava seinastu tíðina gjørt nógv burtur úr Peter Brixtofte og Farum Boldklub, og ikki heilt uttan orsøk. Tó at tað neyvan ber til at sammeta við føroysk viðurskifti, so kemur tað tó eisini fyri her heima, at almennir grunnar onkursvegna stuðla privatum feløgum.

25 stuðlar

Eitt av hesum dømum hongur uppi í HB-húsinum í Gundadali. Í durinum í HB-húsinum hongur ein skjøldur, har 25 silvurplátur eru viðfestar. Á silvurplátunum eru inngrivin nøvnini á 25 einstaklingum ella fyritøkum, sum á ein serstakan hátt hava stuðlað partafelagnum, Havnar Fótbóltur.

Stuðulin, sum hesi 25 – Club 25 – hava latið, er, at tey hava stuðlað rakstrinum hjá fótbóltsfelagnum við 10.000 krónum hvør.

Í sjálvum sær er einki forgjørt í hesum. Ein hin týdningarmesta inntøkukeldan hjá ítróttarfeløgum er júst stuðulspeningur frá vinnulívi og feløgum annars, og at hava eina slíkan »klubba« er als ikki nakað ókent fyribrigdi. Hvørki í Føroyum ella uttanlands.

Tað merkisverda við skjøldrinum í HB-húsinum er, at eitt av nøvnunum, sum er inngrivið á skjøldrinum, er »Framtaksgrunnur Føroya«, og so er spurningurin, hvørt hetta í veruleikanum ikki er stuðul við almennum pengum.

Einki forgjørt

Av ársoknskapinum hjá grunninum framgongur, at:

Tað hevur fingið ilt í summi, at Framtaksgrunnurin stuðlar HB við árligari peningaflyting, men stjórin í grunninum dugir ikki at siggja, at nakað galið er í hesum

»Endamál grunnsins er at gera íløgur í nýggjar verkætlanir ella í víðkað vinnuvirksemi í fyritøkum, herundir fyritøkum, sum hava verið fyri týðandi umskipan ella skuldarumlegging. Tá hesar vísa seg at vera burðardyggar og søluligar, skal grunnurin selja framdar íløgur. Íløgurnar kunnu vera sum innskot av partapeningi ella ábyrgdar lánspeningin. Ein treyt er, at ein ella fleiri peningastovnar út frá egnum kreditmetingum samstundis veita lán upp á í minsta lagi somu upphædd, og ella at aðrir gera íløgu við eginpeningi ella ábyrgdar lánspeningi við somu upphædd.«

Spurningurin er so, hvørt hetta eisini gevur rúm fyri, at grunnurin á slíkan hátt kann veita sponsorpengar til ítróttarfeløg. Ikki minst, tá tað í hesum førinum kann tulkast sum samanfallandi áhugamál, nú ein av nevndarlimunum í báðum feløgunum er hin sami.

Jens Kári Vilhelm er stjóri í Framtaksgrunninum, og hann heldur ikki, at nakað forgjørt er í hesum.

- Hevur tað nú fingið ilt í fólk?. Tað dugi eg ikki rættuliga at siggja, hví nakað skal vera galið í hesum. Tá hetta kom, sat eg sum nevndarformaður hjá Kall, sum júst hevði gjørt sáttmála um at gerast høvuðsstuðul hjá B36. Tað var so eingin, sum fekk ilt av tí, hóast Framtaksgrunnurin átti 38% av partapeninginum í Kalli. HB vendi sær til okkum, og vit játtaðu so at stuðla á hendan hátt, sigur Jens Kári, sum eisini vísur á, at grunnurin umframt at hava latið beinleiðis stuðul til onnur tiltøk, eisini eigur onnur feløg, sum stuðla ítróttarlívinum í landinum. Eitt nú Fiskasøluna og Fiskavirking, sum bæði eru 100% ogn hjá Framtaksgrunninum.

- Frítíðarvirksemið í Føroyum er jú í stóran mun bygt á stuðul, og tí hava vit so einki ímóti at vera ein partur av, sigur Jens Kári Vilhelm at enda.

Hvar er bólturin?



tað er ikki loyvt at kopiera henda lepe

Navn: _____

Bústaður: _____

Tlf: _____

Eg giti, at bólturin er í teigi: _____

Seðilin skal sendast til:
Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan "FCK"

Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er likt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.

Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær plássa á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS